gult cyan magenta svart



# Býráðið vil yvirtaka ítróttahøllina

**Menturnarnevndin hjá Tórshavnar Býráð hevur havt fund við feløgini um eina møguliga yvirtøku av Ítróttahøllini á Hálsi**

ÍTRÓTTAHØLL

*Jákup Mørk*

Tað er eingin loyna, at Ítróttahøllin á Hálsi í Havn nú er um at vera heldur slitin.

Seinastu tíðina hava eisini verið røddir frammi, um at at stórar ábøtur eru neyðugar, og nú er eisini líkt til, at Býráðið av álvara er farið undir at finna eina loysn á málinum.

## Okkurt má gerast

Ein møguleiki tykist vera, at Býráðið yvirtekur høllina, sum í dag er ein sjálvsognarstovnur, og at býráðið á tann hátt í størri mun stendur fyri høllini.

Kaj Leo Johannesen, formaður í menturnevnd býráðsins, sigur við Sosialin, at tey mikukvøldið høvdu ein fund við feløgini, har tey greiddu frá, hvørjar ætlanir mentunarnevndin hevði í so máta.

– Tað vórðu ongar avgerðir tiknar á fundinum. Tað var meira soleiðis, at vit settu feløgunum ein fyrispurning um, hvussu ein slík yvirtøka kann fremjast, og síðani fara tey at viðgera hetta á aðalfundum sínum, sigur Kaj Leo Johannesen.

Hann vísir á, at eftir teirra tykki er tað skilabest, at ábyrgdin fylgir fíggjarliga partinum, og tá tað kortini er býráðið, sum skal gjalda, so kundi hetta verið ein loysn.

– Høllin er í dag í sera ringum standi. Tað sært tú, tá hondbóltsdystir og aðrir dystir verða leiktir, og bara tað at tetta hana fer at kosta einar fýra til fimm milliónir. Skal høllin so eisini svara tíðarkrøvunum, verður talan um munandi meira pening, sigur formaðurin, sum annars heldur, at høllin sjálvandi eigur at liva upp til navnið – Tórshavnar Ítróttar- & samkomuhøll.



*Høllin á Hálsi er í ringum standi, og millum annað er takið ótætt, so tað dryppar niður á gólvið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Missa einki

Ein spurningur, sum ivaleyst er frammaliga í huganum hjá feløgunum í hesum, er, hvørt feløgini framhaldandi kunnu varðveita síni rættindi í høllini, um hendan verður beinleiðis ogn hjá Býráðnum.

Til hetta sigur Kaj Leo, at tað sjálvandi er sera týdningarmikið, at feløgini, sum jú hava lagt lunar undir høllina, framvegis halda síni rættindi.

– Tað verður ógvuliga torført at taka nakrar hallartímar frá teimum, og hetta skal heldur ikki henda.

Verður talan um eina slíka loysn, kunnu feløgini kanska eisini fáa eina kærkomna gávu frá Býráðnum. Tó at formaðurin í mentunarnevndini ikki vil lova nakað, so tykist tað ikki óhugsandi, at hallarleigan møguliga kundi verðið niðursett eftir eina møguliga yvirtøku.

– Hallarleigan kom í sínari tíð fyri at høllin kundi mala runt fíggjarliga. Nú skal eg ikki fara at lova nakað sum helst, men tað má eisini verða eitt mál, at ítróttafeløgini skulu sleppa at hugsa um tað ítróttalliga og tað sosiala í feløgunum, heldur enn at nýta alla orkuna upp á at fáa fíggjarliga partin at hanga saman, sigur Kaj Leo Johannesen at enda.

Akkurát nær, hvussu ella um yvirhøvur ein møgulig yvirtøka skal fara fram, er sostatt ikki greitt enn. Sum sagt, so var talan í fyrsta umfari um ein fyrispurning frá Býráðnum, og væntandi ganga einir tveir mánaðir, áðrenn nakað meira hendir við málinum.


SAS

Euro Bonus

# ALLAR LEIÐIR GEVA STIG

Nú er avtalan millum Atlantic Airways og SAS EuroBonus víðkað til at galda á øllum farleiðum hjá flogfelagnum.

Endamálið við SAS EuroBonus skipanini er at geva teimum, sum ferðast nógv nakrar avsláttarmøguleikar umframt nakrar fyrimunir, sum kunnu lætta um ferðingina.

**EuroBonus skipanin**

EuroBonus virkar á tann hátt, at hvør ferð við einum av flogfeløgunum í SAS EuroBonus samstarvinum, gevur tær nøkur stig. Hesi stig verða so samlað á einari EuroBonus konto, sum tú og tín familja kunnu brúka til bonusferðir.

Somuleiðis fær ein SAS EuroBonus limur avsláttur frá ávísum hotellum og bilútleigarum umframt ymisk sertilboð frá EuroBonus.

**Fyrimunir**

Tað fylgja somuleiðis nakrir fyrimunir við einum SAS EuroBonus korti. Eitt nú framíhjárættur á bíðilistum, møguleiki fyri eyka viðføri uttan meirkostnað og nýtslurættur til fríðtíðartilboð frá SAS EuroBonus. Nakrir av fyrimununum eru tó treytaðir av, at tú hevur eitt ávíst EuroBonus kort.

Tað finnast nevniliga trý sløg av SAS EuroBonus kortum. Grundkortið fáa øll, sum melda seg til, meðan silvur- og gullkortini verða send tær, tá tú hevur spart nóg nógv stig saman.




**1200 stig fyri hvørja ferð**

Ein vanlig einvegis ferð við Atlantic Airways gevur 1200 stig á tíni SAS EuroBonus konto, ímeðan einvegis avsláttarferðir geva 600 stig. Fyri at hava rætt til eina bonusferð, sum er ein tívegis ferðaseðil á eini av farleiðunum hjá Atlantic Airways, skalt tú hava spart saman 20.000 stig.

SAS EuroBonus faldari við tilmeldingarskjali og fyribils korti fáast í flogfarinum ella á skrivstovuni hjá Atlantic Airways. Eftir at hava meldað teg til, fært tú eitt EuroBonus grundkort sendandi, tá fyrstu stigini eru komin á konto.

Hesar ferðir hjá Atlantic Airways telja við í SAS EuroBonus

Føroyar Keypmannahavn

Føroyar Billund

Føroyar Reykjavík

Føroyar Stavanger

Føroyar Aberdeen

Føroyar London

Aberdeen Keypmannahavn

Atlantic Airways

SANSIR TEL 355 355


## Næraberg heim til jóla

Svartkjaftatrolarin Næraberg kemur væntandi til Klaksvík fyrrapartin leygardagin – tollaksmessudag.

Næraberg fór til fiskiskap síðst í november mánaði, eftir at hann hevði verið til umvælingar á norskari skipasmiðju, har stórar broytingar vórðu gjørdar á fabrikkini.

Næraberg hevur fyri tað mesta verið í føroyskum sjógvi, og tá hann gavst at fiska hósmorgunin, høvdu tey framleitt 400 tons av surimi og umleið 190 tons av mjøli. Tá var nakað eftir at framleiða, áðrenn trolarin fer at leggja veiðina upp í Klaksvík.

73 fólk eru við Næraberg hendan túrin, og av teimum eru 13 konufólk. Skipari er Ólavur Biskopstø.

**ek**

## Sundaberg landað 150 tons av flaki

Flakatrolarin hjá JFK Trol, Sundaberg, hevur í vikuni landað 150 tons av flaki á Kósini í Klaksvík. Haraftrat hevði hann eisini nakað av flatfiski.

Sundaberg fór til fiskiskap 18. november og fiskaði í ein lítlan mánað. Hann hevur verið í russiskum øki í Barentshavinum. 32 fólk vóru við hendan túrin.

Sundaberg fer aftur til fiskiskap í Barentshavinum millum jóla og nýggjárs.

**ek**





*Hvilvtenni hevur verið á sínum fyrsta túri, og Kjartan Joensen, reiðari og skipari, er sera væl nøgdur við skipið, men fiskiskapurin kundi verið betri*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Kjartan Joensen, skipari á Hvilvtenni:

# – Vit arbeiða jólaaftan

**Stoltleikin í føroyska rækjuflotanum, Hvilvtenni, hevur verið á sínum fyrsta túri. Kjartan Joensen, reiðari og skipari, er sera væl nøgdur við nýggja skipið. Hann heldur ikki, at føroyskir fiskimenn eru serliga keddir av at vera burtur á jólum. – Teir hugsa heldur um eina góða hýru enn at ganga heima í túninum í nakrar dagar, sigur Kjartan**

HVILVTENNI

*Stefan í Skorini*

Fyri nøkrum mánaðum síðani stevndi Hvilvtenni inn á Fuglafjørð. Hetta var eftir at hava siglt tríggjar ferðir runt við Leirvíks bygd, har Hvilvtenni hevur heimstað.

Kjartan Joensen, reiðari og skipari á Hvilvtenni, lat rækjutrolaran byggja í Noregi. Skipið kostaði góðar 100 milliónir krónur, og tað hevur verið hvørja krónu vert, heldur Kjartan.

Hvilvtenni hevur nú verið á sínum fyrsta túri, men enn hevur skipið ikki verið aftur í Føroyum. Á fyrsta fiskitúrinum var Hvilvtenni á Flemish Cap. Teir fingu eini 500 tons, sum vórðu landað í New Foundlandi.

Hóast Kjartan Joensen er nøgdur við nýggja skipið, so fílist hann á fiskiskapin, sum hevur verið heldur smáligur seinastu tíðina.

– Vit fáa eini trý tons av rækjum um dagin. Slagið er heilt gott, men fiskiskapurin er ikki nóg góður, sigur Kjartan, sum hevur roynt undir Eysturgrønlandi í eina góða viku.

– Vanliga er nøgdin vaksandi frá miðskeiðis í desember, men enn lata rækjurnar bíða eftir sær, sigur Kjartan.

– Skipið riggar fínt, og vit vóna tí, at vit bara kunnu vera her í óavmarkaða tíð, sigur Kjartan.

Kjartan Joensen er tó ikki heilt svartskygdur viðvíkjandi fiskiskapinum, sum hevur verið á einari leið.

Kjartan sigur, at oljuprísurin er ov høgur, og tað er ógvuliga tyngjandi fyri øll føroysk fiskiskip. Prísurin á olju til fiskiskip er meira enn tvífaldaður seinastu tíðina, eftir at hann hevur verið í eini hampuliga fastari legu seinastu tíggju árini.

– Teir skýhøgu oljuprísirnir eru drepandi fyri fiskiskipini, sum skula gjalda so nógv fyri oljuna.

Hesin túrurin verður væntandi av um ein mánað, tá lagt verður inn í Íslandi. Har fara teir at landa í Reykjavík ella á Hafnafirði. Tá fer ein partur av manningini eisini av bátinum, og nýggir menn koma umborð.

## Norðmenn fara heima á jólum

Nú er leiðin løgd til Eysturgrønlands, har fleiri onnur føroysk skip eisini eru stødd. Tey eru Sólborg, Høgifossur, Ocean Castle og Hvilvtenni. Hesi fýra skipini fara at vera undir Eysturgrønlandi um jólini.

Eini trý norsk skip hava eisini verið har um leiðir, men teir bátarnir verða allir lagdir í Reykjavík, til jólini eru farin afturum bak. Tað hevur verið vanligt hjá norðmonnum at leggja bátarnar um jólini. Norsku manningarnar fáa sostatt frí í eina viku og flúgva heim at halda jól saman við familjuni.

Hetta hevur ikki verið vanligt á føroyskum skipum.

– Tað hava vit ikki brúkt, og eg haldi, at tað er bara til órógv fyri fiskiskapin. Tað er so stutt, og tú fært ikki eina viku við hús, sigur Kjartan.

– Føroyski fiskimaðurin hevur sum heild ikki ilt við at vera burtur á jólum. Teir hugsa heldur um at fáa eina góða hýru. Tað er eingin trupulleiki at vera burtur hesa tíðina.

Kjartan Joensen hevur verið sjómaður í 37 ár, og hesa tíðina hevur hann oftari verið til skips enn heima hjá familjuni á jólum.

Um líkindini eru til vildar, so verður jólaaftan vanligur arbeiðsdagur.

## Triði Hvilvtenni

1. mai fyri 25 árum síðani kom tann fyrsti Hvilvtenni til landið. Reiðaríið hjá Kjartani hevur sostatt 25 ár á baki innan rækjuveiðu.

Í 80-unum læt Kjartan tann næsta trolaran byggja, sum eisini varð nevndur Hvilvtenni.

Í ár varð tann triði Hvilvtenni liðugt bygdur og er farin til fiskiskap.

Størsti munurin millum hendan og teir báðar fyrru er motororkan og støddin.

– Nú fiska øll við tveimum trolum og tí krevst sjálvandi eisini størri motororka, sigur Kjartan.

Motorurin á hesum trolaranum hevur 7500 hestar, meðan tann fyrri bara hevði 3000 hestar.

Manningini á Hvilvtenni verður ynskt eini gleðilig jól og eitt gott nýttár.


Tær bestu jólagávurnar fáast í Elding



Venson Western Guitar

SW-300

einans 1.990,-

Sertilboð

Venson Western Guitar við Mikrofon

SW-330

og

Pro Drive akustiskur forsterkari

30 watt, mikrofoninngang, rúmklang

Leidningur og taska

vanl. prísur 6.200 4.800,-



Yamaha keyboard

PSR-260

61 tangentar
nótaundirvísing
100 ymisk ljóð
100 ymisk undirspøl
MIDI
o.m.a.

einans 2.850,-

Yamaha keyboard

PSR-280

61 tangentar
nótaundirvísing
256 ymisk ljóð
100 ymisk undirspøl
6-spor upptakari

einans 3.790,-



ELDING

SMS - Tel 319697 • Saltangará - Tel 449697 • Klaksvík - Tel 479697

petur & petur • 320870